## Yvirlit yvir upplatingartíðir, skeinkingartíðir o.a. serligar dagar

Í § 17, stk. 1-2 matstovulógini[1] eru ásettar almennu upp- og afturlatingartíðirnar fyri virksemi, sum er fevnt av lógini.

**Vanliga upp- og afturlatingartíðin**
Matstovur og skeinkingarstøð, har almenningurin hevur atgongd, skulu sunnudag til hósdag vera afturlatin millum kl. 24:00 og 05:00. Leygarmorgun og sunnumorgun skulu matstovur og skeinkingarstøð lata aftur í seinasta lagi kl. 04:00. Í seinasta lagi 15 minuttir fyri afturlatingartíðina skal skeinkingin halda uppat. Skeinkingartíðirnar fylgja ikki í øllum førum upplatingartíðunum, og vanliga er ikki loyvt at skeinkja áðrenn kl. 11:00 á morgni.

**Upp- og afturlatingartíðir og aðrar reguleringar serligar dagar**
Afturat hesum eru tað í halgidagslógini[2] ásettar avmarkaðar upp- og afturlatingartíðir fyri serligar dagar í árinum. Avmarkingarnar galda fyri tað, sum sambært lógini verður nevnt *offentlige forlystelser*. *Offentlige forlystelser* hevur politiið nágreinað, sbr. politiviðtøkurnar, sum dansur, konsertir, annar livandi tónleikur, sjónleikur, biografur, nektardansur (striptease) o.a., sum krevur loyvi frá politinum, tá talan er um fyriskipað tiltak, har atgongugjald verður kravt. Tónleikur úr hátalara fellur vanliga uttan fyri ásetingina, um ljóðið er so mikið spakuliga frá, at tað ikki órógvar almenna friðin, sbr. § 2 í halgidagslógini.

Politiið í Føroyum og Loyvisnevndin hava í felag gjørt eitt yvirlit yvir, hvussu tað er loyvt matstovum og skeinkingarstøðum, har almenningurin hevur atgongd, at hava opið serligar dagar í árinum. Legg til merkis, at samsvar er ikki í øllum førum millum matstovulógini, sum skipar reglurnar um skeinking, og halgidagslógini, sum skipar reglurnar um almennan frið og *offentlige forlystelser*. Aðrar dagar enn teir niðanfyrinevndu skal virksemið fylgja vanligu upp- og afturlatingartíðunum í matstovulógini, sbr. omanfyri.

| **Dagur** | **Skeinking**<br>*Loyvisnevndin* | **Offentlig forlystelse**<br>*Politiið* | **Viðmerking** |
|---|---|---|---|
| Skírisdagur (hósdagur) | Skeinking er loyvd kl. 11:00-23.45. | Er ikki loyvt sambært § 4, sbr. § 2, í halgidagslógini. | Galdandi allan dagin:<br><br>Eingin larmur má vera, sum kann órógva almenna friðin, sbr. § 4, sbr. § 2 í halgidagslógini. |

[1] Løgtingslóg nr. 183 frá 21. desember 2018 um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi
[2] Kongelig Anordning nr. 441 af 21. november 1923 hvorved Lov nr. 353 af 7. august 1922 om den offentlige Fred paa Folkekirkens Helligdage sættes i Kraft paa Færøerne, sum broytt við løgtingslóg nr. 183 frá 21. desember 2018.

| **Dagur** | **Skeinking**<br>*Loyvisnevndin* | **Offentlig forlystelse**<br>*Politiið* | **Viðmerking** |
|---|---|---|---|
| Langi fríggjadagur<br>(fríggjadagur) | Skeinking er loyvd kl. 11:00-03.45 (leygar-morgun)<br><br>Sí *páskaaftan* | Er ikki loyvt sambært § 4, sbr. § 2, í halgidagslógini. | Galdandi allan dagin<br><br>Eingin larmur má vera, sum kann órógva almenna friðin, sbr. § 4, sbr. § 2 í halgidagslógini. |
| Páskaaftan<br>(leygardagur) | Skeinking er loyvd kl. 00:01-03:45 (leygarmorgun) *og* kl. 11:00-03:45 (sunnumorgun).<br><br>Sí *páskadag* | Er loyvt kl. 00:01-03:45 (leygarmorgun) og annars fram til kl. 23:45 (leygarkvøld). | Loyvt er matstovum og skeinkingar-støðum at hava opið og skeinkja inn í páskadag.<br><br>Loyvt er *ikki* at skipa fyri *offentlig forlystelse*, sum gongur inn í páskadag. |
| Páskadagur<br>(sunnudagur) | Skeinking er loyvd kl. 00:01-03.45 (sunnumorgun) *og* 11:00-23.45 (sunnukvøld).<br><br>Sí *páskaaftan* | Er ikki loyvt sambært § 4, sbr. § 2 í halgidagslógini. | Galdandi allan dagin:<br><br>Eingin larmur má vera, sum kann órógva almenna friðin, sbr. § 4, sbr. § 2 í halgidagslógini. |
| 2. páskadagur<br>(mánadagur) | Skeinking er loyvd kl. 11:00-03:45 (týsmorgun).<br><br>Undantakið frá vanligu upplatingartíðini er grundað á, at talan er um gamalt dansikvøld. | Loyvt kl. 16:00-03.45 (týsmorgun).<br><br>Undantakið frá vanligu upplatingartíðini er grundað á, at talan er um gamalt dansikvøld. | Millum kl. 09:00 og 16:00 má eingin lamur vera, sum kann órógva almenna friðin, sbr. § 2 í hagidagslógini. |
| Dýri biðidagur<br>(fríggjadagur) | Skeinking er loyvd kl. 11:00-03:45 (leygarmorgun). | Loyvt kl. 16:00-03.45. | Millum kl. 09:00 og 16:00 má eingin lamur vera, sum kann órógva almenna friðin, sbr. § 2 í hagidagslógini. |

| **Dagur** | **Skeinking**<br>*Loyvisnevndin* | **Offentlig forlystelse**<br>*Politiið* | **Viðmerking** |
|---|---|---|---|
| Kristi himmalsferðardagur (hósdagur) | Skeinking er loyvd kl. 11:00-23:45. | Loyvt kl. 16:00-23:45 | Millum kl. 09:00 og 16:00 má eingin lamur vera, sum kann órógva almenna friðin, sbr. § 2 í hagidagslógini. |
| Hvítusunnuaftan (leygardagur) | Skeinking er loyvd kl. 11:00-03:45 (sunnumorgun) | Loyvt til kl. 23:45 (leygarkvøld). | |
| Hvítusunnudagur (sunnudagur) | Skeinking er loyvd kl. 11:00-23.45. | Er ikki loyvt sambært § 4, sbr. § 2 í halgidagslógini. | Galdandi allan dagin:<br><br>Eingin larmur má vera, sum kann órógva almenna friðin, sbr. § 4, sbr. § 2 í halgidagslógini. |
| 2. hvítusunnudagur (mánadagur) | Skeinking er loyvd kl. 11:00-03:45. | Loyvt kl. 16:00-03.45 | Millum kl. 09:00 og 16:00 má eingin lamur vera, sum kann órógva almenna friðin, sbr. § 2 í halgidagslógini. |
| Ólavsøkuaftan | Skeinking er loyvd kl. 11:00-03:45 (tann 29. juli). | Loyvt allan dagin og til kl. 03:45 (tann 29. juli). | Politiið gevur loyvi eftir kap. 8 í politiviðtøkuni fyri Tórshavnar kommunu<br><br>Tíðirnar eru galdandi uttan mun til, hvønn vikudag, ólavsøkuaftan fellur. |
| Ólavsøkudagur | Skeinking er loyvd kl. 11:00-03:45 (tann 30. juli) | Loyvt allan dagin og til kl. 03:45 (tann 30. juli). | Politiið gevur loyvi eftir kap. 8 í politiviðtøkuni fyri Tórshavnar kommunu<br><br>Tíðirnar eru galdandi uttan mun til, hvønn vikudag, ólavsøkudagur fellur. |

| **Dagur** | **Skeinking**<br>*Loyvisnevndin* | **Offentlig forlystelse**<br>*Politiið* | **Viðmerking** |
|---|---|---|---|
| Jólaaftan | Skeinking er loyvd kl. 11:00-23:45 *ella* kl. 11.00-03.45.<br><br>Sí viðmerking. | *Bert loyvt* kl. 00:01-03:45 (jólaaftans-morgun), um tollaksmessudagur er fríggjadag ella leygardag.<br><br>Annars loyvt fram til kl. 23:45 (jólaaftan). | Fyrra skeinkingartíðin er galdandi, um jólaaftan er sunnudag-hósdag. Seinna skeinkingartíðin er galdandi, um jólaaftan er fríggjdag ella leygardag. |
| Jóladagur | Skeinking er loyvd kl. 11:00-03.45.<br><br>Sí *2. jóladag.* | Er ikki loyvt sambært § 4, sbr. § 2 í halgidagslógini. | Galdandi allan dagin:<br><br>Eingin larmur má vera, sum kann órógva almenna friðin, sbr. § 4, sbr. § 2 í halgidagslógini. |
| 2. jóladagur | Skeinking er loyvd kl. 00:01-03:45 (26. desember) *og* kl. 11.00-03:45 (27. desember). | Er loyvt kl. 00:01-03.45 (26. desember) *og* kl. 16.00-03:45 (27. desember), sbr. tó niðanfyri.<br><br>Ikki loyvt í tíðini kl. 09:00-16:00 tann 26. desember. | Millum kl. 09:00 og 16:00 má eingin lamur vera, sum kann órógva almenna friðin, sbr. § 2 í hagidagslógini.<br><br>Undantakið frá vanligu upplatingar-tíðini er grundað á, at talan er um gamalt dansikvøld. |
| Nýggjársaftan | Skeinking er loyvd kl. 11:00-03:45 (nýggjársdagsmorgun). | Er loyvt allan dagin og til kl. 03:45 (nýggjársdagsmorgun). | Politiið gevur loyvi eftir kap. 8 í politiviðtøkuni fyri Tórshavnar kommunu |
| Nýggjársdagur | Skeinking er loyvd kl. 11:00-23:45 *ella* 03.45.<br><br>Sí viðmerking. | Loyvt kl. 00:01-03.45. | Millum kl. 09:00 og 16:00 má eingin lamur vera, sum kann órógva almenna friðin, sbr. § 2 í hagidagslógini. |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | | Fyrra skeinkingartíðin er galdandi, um nýggjársdagur er sunnudag-hósdag. Seinna skeinkingartíðin er galdandi, um nýggjársdagur er fríggjdag ella leygardag. |